# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Franskir hermenn tóku lut í hópmorðinum og neyðtóku fleiri kvinnur, sum sluppu livandi frá fólkamorðinum*

*rwandisk frágreiðing*




*Á hesari myndini, sum er tikin tann 27. juni í 1994, síggjast franskir hermenn millum rwandiskar stjórnarhermenn av hutu-fólkinum nærhendis býnum Gisenyie*

*Mynd: AFP*

# Frakland átti lut í fólkamorði í Rwanda

Frakland hevði ein virknan lut í fólkadrápinum í Rwanda í 1994. Tað er ein av niðurstøðunum í einari frágreiðing, sum rwandiska stjórnin hevur latið gera.

Fólk, sum sluppu livandi frá fólkadrápinum, hava fleiri ferðir lagt Frakland undir at hava vant álopslið ig teir stjórnarhermenninar, sum skipaðu fyri fólkadrápinum, sum kostaði umleið 800.000 mannalív. Í teirri nýggju frágreiðingini, sum ein serlig kanningarnevnd hevur gjørt fyri stjórnina, verða franskir politikarar og franska fregnartænastan lagd undir at hava mevirkað til fólkamorðið. Nevndin mælir eisini stjórnini til at stevna teimum fyri rættin.

- Millum teir fronsku politikararnar, sum eru nevndir í rwandisku frágreiðingini, eru fyrrverandi forsetin Francois Mitterand, fyrrverandi forsætisráðharrin Edouard Balladur og fyrrverandi uttanríkisráðharrin Alain Juppe. Sambært frágreiðingini styðjaðu teir hópmorðið politiskt og hernaðarliga.

### Umhugsa sak

- Franskir hermenn vóru beinleiðis við í álopum, sum høvdu til endamáls at beina fyri fólki, sum vórðu løgd undir at fjala fólk av tutsi-ættini. Franskir hermenn neyðtóku fleiri tutsikvinnur, sum sluppu livandi frá hópmorðinum, stendur millum í frágreiðingini. Har stendur eisini, at fronsku myndugleikarnir vóru leingi vitandi um, at fólkamorðið bleiv lagt til rættis, og teir høvdu eisini medábyrgd av tí, sum hendi.

Rwandiski løgmálaráðharrin, Tharcisse Karugarama, segði í gjár, at frágreiðingin gevur rwandisku myndugleikunum grundarlag fyri at reisa sak ímóti fronskum einstaklingum ella franska statinum. Hann gjørdi tó vart við, at enn hevur stjórnin ikki tikið nakra avgerð um møguliga rættarsókn.

Franska stjórnin hevur ikki gjørt nakrar viðmerkingar til frágreiðingina, skrivar AFP úr París.

# Lønarmunur veksur í Danmark

**Meðan lønarmunurin millum tey bæði kynini minkar í hinum ES-londunum, veksur hann í Danmark, og tað eru menninir, sum draga frá**

Tøl, sum tann evropeiska fakfelagsrørslan ETUC hevur savnað, vísa, at munurin á tímalønini hjá donskum monnum og kvinnum veksur, meðan hann er minkandi í hinum ES-londunum. Og ikki óvæntað er tað lønin hjá monnunum, sum dregur frá kvinnulønini.

Eftir tølunum er munurin á tímalønini hjá monnum og kvinnum í Danmark vaksin tvey prosent síðani 2001. Í sama tíðarskeiði hevur gongdin verið tann beint øvugta í hinum ES-londunum, og sum heild er munurin á lønini hjá monnum og kvinnum í hinum ES-londunum minkaður eitt prosent tey seinastu sjey árini, sigur ETUC.

Avdúkingin hjá evropeisku fakfelagsrørsluni hevur sum vera man elvt til politiskt kjak í Danmark. Sosialdemokratarnir geva stjórnini og hennara arbeiðsmarknaðarpolitikki skyldina, meðan stjórnarflokkurin Vinstra vil sleppa at bíða eftir einari frágreiðing, sum kemur seinni í ár, og sum júst skal lýsa trupulleikar við lønarmuni millum menn og kvinnur.

## STUTT SAGT

### Valstríðið harðnar

Ta seinastu vikuna hevur John McCain hert atfinningarnar at kappingarneytanum Barrack Obama, og úrslitið er, at Obama, sum fylti 47 mánadagin, er ikki frammanfyri í meiningakanningunum longur. Summar kanningar siga, at tað stendur á jøvnum teirra millum, og aðrar siga, at McCain er frammanfyri.

Í gjár fór Obama undir eina reklamuherferð í fjølmiðlunum, har hann leggur McCain undir at hava tikið ímóti nøgvum pengum frá oljufeløgunum til valstríðið, samstundis sum benzinprísdirnir hækka og tyngja gernadisdagin hjá teimum longu illa trongdu amerikanarunum. Eisini verður róð framundir, at McCain er sum George W. Bush, sum ofta hevur verið lagdur undir at vera í lummanum hjá oljufeløgunum.



*John McCain hevur fingið Barrack Obama aftur Mynd: Polfoto*

### Stoltenberg heiðraður

Fyrrverandi norski uttanríkisráðharrin Thorvald Stoltenberg er tilnevndur heiðursborgari í makedonska høvuðsstaðnum Skopje. Tá tann ógvusligi jarðskjálvtin rakti Skopje í 1963, var Stoltenberg embætismaður á norsku sendistovuni í Beograd, og hann útvegaði teimum heimleysu í býnum 2.300 ullir teppir, 80 kilo av heilivági, 250 blóðpakkar og 500 pakkar við fyrstuhjálparútgerð.

- Thorvald Stoltenberg er ein góður vinur, og hann gjørdí eitt stórt arbeiði fyri at útvega Reyða Krossi ta neyðugu og harafturat skjótu hjálpina eftir jarðskjálvtan í 1963, sigur nevndin, sum hevur gjørt av at gera hann til heiðursborgara í Skopje. Millum teirra,sum fyrr hava fingið heitið, eru fyrrverasndi norski kongurin Olav V, Christopher Hill, Lawrence Eaglebergerog Tito.



*Thorvald Stoltenberg er nú heiðursborgari í Skopje*

*Mynd: Polfoto*